


*Nr. 18* *1. september 2013* *73. árg.*

# Náðin nóg mikið

*Náði mín er tær nóg mikið. 2.Kor.12,9.*

**Nóg mikið**, tí Guds náði vigar meira enn okkara mongu syndir. **Nóg mikið**, tí Jesus á krossinum segði: ”Tað er fullgjørt.” **Nóg mikið**, tí Guds lyftir telja meira enn okkara erfaringar. **Nóg mikið**, tí okkara trúloysi ongantíð kann gera Guds trúfesti til onkis. **Nóg mikið**, tí at hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, eisini vil geva okkum alt við honum. **Nóg mikið**, tí vit hava Jesu orð fyri, at ongin skal ríva okkum úr hansara hond, um vit fylgja honum.

Ja, men hvussu kunna vit vita, um Harrans náði er **nóg mikið**? Ongin veit, hvat ið kemur. Ongin veit, um trúgvin røkkur, um hon verður løgd undir hart trýst. Vit hava erfarið, at trúgvin sveik avgerandi løtuna. Sambandið varð slitið, og óttin tók valdið á okkum. Hugsa tær, at vit ein dag av álvara koma út í eitt ódnarveður, hvussu verður tá? Og hvussu fer at gangast í seinastu náttarvøkuni? Tað liggur nær at spyrja soleiðis, men tað gagnar ongum. Ikki fáa vit Guds kraft sum forskot, og hvørja ferð, vit royna at máta styrkina í okkara trúarviðurskiftum, renna vit okkum út á avvegir. ”Mín náði er tær **nóg mikið**.” Tað eru eini boð, sum koma til okkara frá Gudi. Ikki verður sagt: Mín náði **skal** vera tær **nóg mikið**. Nei, hon er **nóg mikið**. Bjarging er at finna; tú **kanst** verða frelstur, ikki tí trúgvin er sterk, men tí Guds trúfesti er stórt. – Tá ið tann sterkasti tekur sær av søk okkara og bjóðar fíggindanum av við uppreistrarsigrinum – tá ið tann altvaldandi Gud gevur okkum loyvi at hvíla í, at **hann** vil útfría okkum úr fíggindans hond og fult og heilt frelsa okkum, so er tað **nóg mikið**.

„Mín náði er tær **nóg mikið**.” Skulu vit sanna frígeringina í teimum orðunum, mugu vit líta at Jesusi. Og ikki aðrar vegir.

”Komið til mín, øll tit, sum ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu,” sigur hann. **Hvílu** – hví? Tí náði hansara er **nóg mikið**.

*Jesus, mín klettur,*
*aldri eg sleppa tær kann;*
*tryggasti blettur,*
*við tær eg sálarfrið fann.*

*Jesus, mín viti,*
*lýs tú mær døkkastu nátt,*
*og tá eg flyti*
*heim, inn um himmalsins gátt.*

*Jesus, mín gleði,*
*troyst mín í svárastu neyð,*
*lætnar mín tregi,*
*tá ið meg minnist tín deyð.*

*Jesus, sum doyði,*
*so at eg lív kundi fá,*
*teg eg nú eigi,*
*og til tín stendur mín trá*

*Jesus umsíðir*
*førir meg til síni lond,*
*ævigar tíðir*
*verða í hansara nánd.*

# Dyrnar

Ein professari í plantufrøði helt einaferð ein fyrilestur fyri nøkrum skúlabørnum. Við góðum ljósmyndum vísti hann nógv loyndarmál viðvíkjandi vøkstri. At enda greiddi hann frá tí fyrstu kyknuni – grundarlagi lívsins.

Hann greiddi soleiðis frá:

”Vit vita ikki, hvat tað er, sum gevur tí lítlu kyknuni lív – kraft at liva, kraft at vaksa. Alt livandi er gjørt úr kyknum. Meira vita vit ikki. Hesar dyrnar eru latnar aftur fyri okkum. Innan fyri dyrnar, haðani øll lívskraft kemur, er eitt loyndarmál, eitt ófatiligt loyndarmál.”

Tá sigur eitt góðvarið barn:

„Haldið mær til góða, professari, býr Gud innan fyri hasar dyrnar?” Professarin gjørdist ørkymlaður og visti ikki, hvat hann skuldi svara.

Vit høvdu svarað, at innan fyri hasar dyrnar býr Gud.

*t.* týddi.

# At hvíla í vissuni

Tá ið kendi fysikarin Michael Faraday lá til tað seinasta, spurdi ein av vinum hansara hann: ”Hvat grundar tú um nú?”

Hann svaraði: ”Eg havi ongar hugsanir; eg hvíli í vissuni um tann nakna veruleikan, at eg veit, hvønn eg trúgvi á og eri vissur í, at hann er mentur at varðveita tað, sum hann hevur litið mær til, til hin dagin.”

# Mistreysti

Øll vita vit, at mistreysti kann níva okkum – vit vita kanska ikki hví. Tað, sum eyðkennir mistreysti, er tað sjáldsama, at mangan tyktist tað ógjørligt at vísa á eina grund til tess.

Mistreystið kemur sum rekandi skýggj uttanífrá ella sum andligur mjørki, ið stígur upp úr sálardýpinum. Og so verður dagurin myrkur og hýrurin ringur. Men mistreysti er av tí ónda. Tað eigur ikki lívsins rætt í einari kristnari mannasál.

Og kortini er tað ikki so lætt at reka burtur. Enntá uggi kann gera ilt verri og kann eggja tí mistreysta at mæla ímóti. Tí sigur tann, sum Orðatøkini hevur skrivað: ”Eins og tann, sum letur seg úr klæðunum ein kuldadag, eins og edikur í natron, soleiðis er tann, sum syngur sangir fyri sorgarbundnum hjarta.

Kortini fari eg at royna at syngja fyri tí mistreysta! Tað er ein tóni, sum mangan ein tungan dag hevur styrkt sál mína.

Tað eru Harrans orð: ”Eg vil vera við tær; eg skal ikki sleppa tær og ikki fara frá tær.”

Hetta eru góð orð eisini til tann mistreysta, um so mistreystið stendst av, at tú ikki hevur hugsað um orð Harrans, meðan stundir vóru, ella mistreystið er í holdið borið. Synda ikki, tá ið mistreystið nívir! Lat orðini ljóða fyri tær:

”Eg, Harrin, skal ikki sleppa tær og ikki fara frá tær!”

Og lat so tey gomlu orðini svara aftur í sál tíni: ”Harrin er hjálpari mín, eg vil ikki óttast.”

Mistreystið víkur kanska ikki beinan vegin frá tær. Men tann, sum lýðir á Guds borgan fyri, at hann sleppir okkum ikki, hann ger tað besta, hann megnar tann dagin, sum mistreystið nívir okkum. Og tí er Guds hjálp á veg!

Høvdu hesi orðini ein myrkan, tungan dag borið frið í eina mistreysta sál!

*t.* týddi.

# Fólk hava altíð eina meining um teg

Ein fyrrverandi alkoholikari vitnaði niðri á Blákrosskaféini:

Fyrr, tá ið eg gekk rúsaður og válaði í Havnar gøtum, søgdu fólk: “Hann gongur sum ein apukattur!” Og tað passaði. Tá ið eg so legði av, søgdu tey: “Nú er hann fanatikari!” Tá ið eg so fór at ganga á møti, søgdu tey: “Nú er hann vorðin svakur!” Fólk hava altíð eina meining um teg. Lat ikki teirra hugsan stýra lívi tínum. Tey eru hóast alt bara mold og støv og øska og kunnu liggja stív og køld hvørja løtu, tað skal vera. Harrin hevur sett meg í frælsi fyri mannaótta. Eg eri púra fríur og frælsur.

*e.c.* ums.

# Jesus segði: Farið!

Í Markus 16 kom Jesus við missiónsboðunum: Farið út í allan heimin og boðið evangeliið, gleðiboðini. Hetta er lykilin at røkka okkara ættarliði.

Alt í einum sá eg nakað nýtt í hesum teksti! Hví skulu vit fara út? Hví skulu vit boða? Í fyrstu Mósebók lesa vit frásøgnina um, tá ið Gud skapaði himmalin og jørðina. Tað var ruðuleiki í tíðini undan skapanini. Eitt tjúkt myrkur lá yvir jørðini, og Guds Andi sveimaði yvir vøtnunum.

Hví sveimaði Guds Andi yvir vøtnunum, meðan einki hendi? Jú, tað var, sum Andin bíðaði eftir onkrum. Hvørjum bíðaði hann eftir? Tí talaða orðinum! Einki hendi, fyrr enn Gud talaði. Tá fyrstani hendir tað.

Evangeliið má verða boðað í einum landi, har ruðuleiki ræður. Boða Orðið! Heilagi Andin vil samstarva við Orðsins boðberar. Tíðindi eru bara tíðindi, tá ið samskift verður um tey. Salvingin flýtur, tá ið Orðið verður boðað, og tað brýtur okið. Eg havi bara eina tráan: Vit skulu vinna sálir! Boða Orðið, og tú fært stuðul úr himli.

Í Jesaja kap. 6 lesa vit um, hvussu Jesaja fekk kallið til tænastuna. Jesaja hoyrdi av tilvild eina samrøðu í himli og rødd Harrans, sum segði: Hvønn skal eg senda? Hvør vil fara við boðum frá okkum?

Beinanvegin Jesaja hoyrdi orðini, svaraði hann. Tað sama hendi, tá ið Jesus kallaði lærusveinarnar. Bíblian sigur, at teir við tað sama fóru frá øllum og fylgdu honum. Jesaja fór sjálvboðin. Sama gjørdi eg, tá ið Gud kallaði meg. Jesaja rópti frá jørðini upp móti himli: "Sí, her eri eg! Send meg!" Jesaja segði, at hann hevði óreinar varrar; men Gud reinsaði hann. Hann vil eisini reinsa okkum og útgera okkum til tænastu.

Sama hendi Samsoni. Hesin fráfalni maðurin bað um Guds kraft eina ferð afturat. Tá ið kraftin kom aftur, og hann gav lív sítt fyri at sigra á filistum, gjørdist hann ein mynd av Jesusi. Hann breyt allan bygningin í senn sum svar upp á bøn sína um kraft.

Hann strekti armar sínar út. Við aðrari hondini tók hann um aðra súluna, sum helt bygninginum uppi, og við hinari hondini tók hann um hina. Jesus strekti eisini báðar armar sínar út, annan til frelsu og annan til grøðing.

*Effie Campbell* umsetti.

---

My boss is a jew - mín stjóri er ein jødi. Set ikki Jesus á 2., 3. ella 4. plássið. Tað vil hann als ikki hava.

*e.c.* ums.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74